# Danland: Eitt subtropiskt baðiland

Í Blokhus liggur baðilandið »Danland Blokhus« ið er sera vælumtókt millum Føroyingar. Danland Blokhus er líka lokkandi um heystið, tá bløðini detta av trøðnum og býurin verður róligari, sum um summari. Beint uttanfyri strekkir strondin seg frá Rødhus í suðri til Løkken í norði, og gevur hetta høvi til at njóta tað fantastiska útsýni. Hæddarpunktið á feriuni er tað subtropiska baðilandið, ið Danland hevur at bjóða. Her kunnu vitjandi stuttleika sær í aldunum, føla súsið á tí stóra skreiðbananum, svimja nakrar longdir í hylinum ella taka sær av løttum í gosbaðnum, hitarúminum og poolbarrini.

Allar íbúðir hava svalir ella terassu, og tær flestu 2-rúms íbúðirnar hava náttúru útsýni.

Frá Blokhus er sera einfalt og skjótt at koyra til eitt nú Nordsøen Oceanarium í Hirtshals, Aalborg Zoo og aðrar spennandi attraktiónir.





## Alt um fiskar í Norðsjónum

Í Hirtshals liggur størsta akvariumið í Norðurevropa. Her er mangt og hvat at síggja og uppliva bæði fyri vaksin og børn.

Í 2003 brendi “Nordsøen Oceanarium” men var endurreist og lat upp aftur á summri 2005. Tann størsta attraktiónin áðrenn eldin var klumpfiskurin, Klumpe. Hesin doyði í eldinum, men nú hevur sentri fingið tveir nýggjar klumpfiskar, Anton og Andrea.

Umframt klumpfiskanir eru ein ørgrynna av øðrun fiskum at síggja. Eisini hevur sentri eitt stórt uttandura kar “Sælariet”, ið hýsir upp til 10 kópum alt árið. Her fáa vitjandi millum annað møguleika fyri at verða við til at fóðra kóparnar. Undir “Sælariet” er ein glastunnil, ið gevur høvi til at síggja, hvussu kóparnir spæla undir vatninum og síggja teir forvitnast meðan teir svimja heilt tætt at glasinum fyri at hyggja eftir tær.

Vitjandi kunnu eisini fara á “Nordsølaboratoriet” har ein kann læra alt um fiskar og onnur havdjór ið liva í Norðsjónum.



## Heimsins landdjór í Aalborg Zoo

Tætt við miðbýin í Aalborg liggur “Aalborg Zoo” sum ein grøn oasa við 140 ymiskum djórasløgum, ið bíðar eftir at bjóða vitjandi nógvar serstakar upplivingar.

Aalborg Zoo er einasta staðið í Danmark, har vitjandi kunnu síggja og uppliva verðins størsta landdjór, tann afrikanska filin og tí stóru menniskja apuna úr Borneo, Orangutangin. Kulissan av einum grønlendskum fjørði gevur høvi til at síggja ísbjarnir bæði yvir og undir vatninum. Eitt sindur av Madagaskar er eisini at síggja, eitt nú hálvapur, lemurar og fossair. Tamarinir, kaimanir, leguanir og pílagift froskar eru nøkur av teimum sermerktur djórasløgunum ein kann hitta í Aaborg Zoo. Her eru eisini klappigeitir til tey smáu og sjóleyvur og pingvinar. Í garðinum er eisini matstova og stórt spælipláss til børnini.



*Ísbjarnirnar eru sera væl umtóktar í Aalborg Zoo*

Aalborg Zoo lat upp í 1935 og hevur í dag uml. 375.000 vitjandi um árið. Har eru 138 djórasløg og fleiri enn 1.200 djór.

## Blokhus - sjarmerandi feriuparadís



*Vesturstrondin*

Blokhus hevur 21 kilometrar av longum hvítum sandstrondum. Kenningar vilja verða við, at hesar strendur eru millum tær bestu í Norðurevropa. Fínur hvítur sandur, flottir sandheyggjar og frískt blátt hav. Strendurnar hava fingið kvalitetsstemplið »Blátt flagg« frá EU.

Baklandið, við tí fantastisku náttúruni, bjóðar fólki eitt hav av møguleikum av gongutúrum í skóginum og mosanum, har tú kanst njóta náttúruna og friðin.

Hvør árstíð hevur sína sjarmu. Eftir ein heystar illveðursdag, kanst tú verða heppin og finna rav í tí váta sandinum ella ein annan av teimum mongu flottu steinunum, ið verða brúktir til at gera hálsprýði, ringar og annað.

Blokhus, ein gomul fiskibygd, ið nú er miðdepilin í einum sjarmerandi og internationalum feriuparadísi har serliga matstovulívið og ferðafólkahandlarnir seta dám á býin.

## 22 golfvallir í at velja

Hóast Norðurjylland ikki er serliga stórt, hevur økið fingið eitt altjóða orð á seg ímillum golfspælarir kring alt Evropa.

Heili 22 golfvallir eru at velja ímillum hjá tí kræsna golfentusiastinum og tann skiftandi náttúran syrgir fyri, at tað eru golf avbjóðingar og náttúruupplivingar fyri øll – árið runt. Veljast kann m.a. ímillum seaside-vallir, ið liggja við stórfingnu vesturhavsstrondina og parklíknandi vallir inni í býum.

Í Blokhus er “Blokhus Klit Golf Center”, ið hevur allar hentleikar, ið kann væntast av einum framkomnum golfsentri. Har er m. a. góð venjingarútgerð við einari yvirdekkaðari driving range, einum hugnaligurmPitch & Putt bana við 9 holum, Pay & Play bani við 9 holum og ein Golfcafé.



*Golf í Norðurjyllandi*

## Aalborg handilsbýur

London hevur Oxford Street, Paris hevur Champs Élysées. Aalborg er eingin høvuðsstaður men hinvegin hevur Aalborg heili tvær stórar gongugøtur: Bispensgade og Algade. Hesar gongugøtur ganga parallelt gjøgnum hjartað av Aalborg og eru eina vitjan verdar. Hesar báðar hava fleiri síðugøtur, ið hava eina ørgrynnu av spennandi handlum og matstovum.

Á Nytorvet eru tvey stór vøruhús: Salling og Føtex.

Í City Syd er stórs innkeypssentrið ”Aalborg Storcenter” ið hevur 60 handlar, harímillum tað vælumtókta Bilka. Her kann ein ganga ein heilan dag og shoppa uttan at hugsa um veður og vind.



*Hugni í Aalborg eftir ein langan shoppingdag*